Mamma Ova, Olevina Joensen:

Ove var ongantíð bangin

- Mær dámdi einki, tá ið Ove byrjaði at tosa um at rógva úr Føroyum til Danmarkar. Men eg segði einki, tí eg visti, at tað nyttaði einki. Hevði hann fyrst sett sær fyri at fremja hetta, gavst hann ikki, fyrr enn hann var komin á mál. Soleiðis var Ove, sigur 82 ára gamla mamma Ova, Olevina Joensen

SAMRØÐA
Vilmund Jacobsen

Olevina Joensen avdúkar minnissteinin, sum er reistur í Nólsoy

Mynd: Poul Hansen

»Livdi í ódn, doyði í logn«.

Soleiðis skrivar Finnbogi Ísakson í bók síni »Aftur og fram« um Ova, tá ið hann doyði.

Mamma Ova, Olevina Joensen, heldur, at hesi orðini um sonin eru rættliga beinrakin.

- Ove var eitt gott menniskja; hann var vitugur og nærlagdur og hevði stóran áhuga fyri øllum tí, sum fyriforst á havinum. Tíðin, hann sigldi við fiskiskipi, skúlaskipi og farmaskipi, hevði lært hann nógv um veður, vind og streymviðurskifti. Hann hevði virðing fyri náttúrukreftunum og visti, at skil skuldi til, um komast skuldi um hav, men Ove hevði eina sterka sál og var ongantíð bangin á sjógv.

Stúrin mamma

Vina, sum mamman vanliga verður rópt, sigur, at dreymurin hjá Ova at rógva úr Føroyum til Danmarkar, birtist, tá ið hann við seglbáti einaferð sigldi úr Ameriku til Australiu.

- Tá setti hann sær fyri at rógva úr Føroyum til Danmarkar. Mær dámdi hetta einki, men eg visti, at tað nyttaði einki at siga nakað. Tí, setti Ove sær fyrst nakað fyri, helmaði hann ikki í, fyrr enn málið var rokkið.

Trý fylgjandi summur royndi hann at fremja hesa ætlan, árini 1984, 1985 og 1986. Tey bæði fyrru setti hann upp í Hetlandi, men triðju ferðina, hann royndi, eydnaðist honum at fremja dreymin, hann hevði sett sær.

- Líka so stúrin, sum eg var, táið Ove byrjaði at tosa um sína ætlan, líka so spent vóru vit øll, tá ið Ove nærkaðist danska meginlandinum.

Vina sigur, at á seinastu ferðini hjá Ova millum londini frætti hon ofta frá Birgiri Andreasen, sum hevði gott samskifti við Ova á allari ferðini.

- Men so vóru dagar, har vit einki frættu, og tá birtist óttin aftur í brósti.

Hon sigur, at ringast var, tá ið Ove fór undir at gera seinastu royndina.

- Hann ætlaði at gevast, tá ið onnur royndin miseydnaðist.

Men eg haldi, at fólk høvdu hug at arga hann og minna hann á, at hann nú kortini ikki megnaði at gera dreymin til veruleika. Tá setti hann - sær sjálvum so líkt - sær fyri, at hann skuldi royna einaferð aftrat, sigur Vina.

Stór gleði…

Tað var ein gleðisdagur í heiminum á Bátatúgvuni í Nólsoy, tá ið Ove legði at í Thyborøn.

- Vit vóru ógvuliga glað hansara vegna. Nú ivaðust vit ikki longur í, at Ove fór at megna at fremja verk sítt, og vit fóru øll at fyrireika okkum til Danmarkartúrin at taka ímóti Ova á Longulinju. Maður mín, Vilhjálmur, sum var sjúkur, kundi ikki koma við til Danmarkar. Men annars fór vit øll avstað saman við fleiri øðrum í familjuni.

Vina sigur, at tað var ein stór løta hjá henni og børnunum, tá ið Ove nærkaðist Longulinju – helst ein tann størsta løtan í lívinum.

- Men har var ein so stór mannfjøld og tók ímóti, at vit sluppu næstan ikki framat. Tað var ikki meira enn, at eg slapp at heilsa uppá sonin, sigur hon.

Hon sigur, at Ove var ógvuliga glaður, tá ið hann legði at landi undir kendu havfrúnni, steig í land og kysti hana, sum hann hevði sagt, at hann vildi gera.

- Ove var upptikin alla tíðina hesa stóru løtu, og tað var ógvuliga torført at sleppa framat honum. Tað var ikki, fyrr enn á einum hotelli, at vit veruliga sluppu heilsa uppá hann, sigur Vina.

Doyði í logn

Eftir at Ove Joensen hevði fullført sína ætlan, var næstan ongantíð friður um hansara persón. Hann ferðaðist fyrst í Danmark og síðan í Føroyum. Øll vildu hitta Ova og síggja snotuliga bátin, Dianu Victoriu.

- Saman við gleðini um, at Ove hevði nátt tí máli, hann hevði sett sær, var eisini óttin um, hvat hetta nú kundi føra til, sigur Vina.

Ove druknaði á Skálafjørðinum, 26. november 1987 – á sjálvum føðingardegnum hjá yngsta beiggjanum, Villy, sum druknaði í Havn trý ár frammanundan.

- Ove ringdi hetta kvøldið og segði, at hann ætlaði sær út til Nólsoyar við Dianu Victoriu. Bað beiggja sín koma inn ímóti sær við báti. Beiggin var ikki inni, men fór avstað so skjótt, tað bar honum til. Vina sigur, at tá ið teir komu inn á Skálafjørðin, funnu teir ongan bát. Teir løgdu at landi á Strondum fyri at spyrja eftir Ova, men eingin visti um hann at siga.

- Hetta kvøldið, hann fór umborð á Dianu Victoriu, var frost og hált. Vit rokna tí við, at hann er gliðin í bátinum, og í fallinum hevur hann sligið andlitið í og er vorðin vitleysur. Tað sást á andlitinum á Ova, tá ið hann seinni var funnin, at hann hevði sligið seg í. Ove var annars ein góður svimjari, sigur hon.

Vina sigur, at tað var undarligt og ógvuliga tungt at missa Ova eitt góðveðurskvøld á Skálafjørðinum, tá ið hann annars hevði lagt so nógv fyri í sínari tíð á havinum.

- Í dag fegnist eg um, at ein minnissteinur er reistur í bygdini yvir Ova, og vit fegnast øll um, at stevnan, sum nú hevur 10 ár á baki, hevur eydnast so væl.

Olevina Joensen sigur, at tað hevði glett hana nógv, nú hon er vorðin 82 ára gomul, um svimjihylurin, sum bygdur verður til børnini í Nólsoy, hevði staðið liðugur um ikki alt ov mong ár.

Stevnan í ár er tann 10. í røðini

12 ára gamal fer at svimja um Nólsoyarfjørð

5-ára gamli, Teitur, er ógvuliga spendur, um stóribeiggi, Tórur, fer at megna at svimja um Nólsoyarfjørð í dag.

Mynd: Maria Olsen

Tórur Hansen verður yngsti luttakari nakrantíð, sum fer at royna at fremja roysnið at svimja úr Havn til Nólsoyar. Saman við øðrum svimjarum, leypir hann á bláman í Havn í dag

STUÐULSSVIMJING
Vilmund Jacobsen

Í fleiri ár hevur verið skipað fyri stuðulssvimjing um Nólsoyarfjørð á ovastevnu. Flestu árini hevur verið svomið leygardag, tá ið stevnutiltøkini eru í hæddini, men okkurt árið hevur verið neyðugt at lagt dagin øðrvísi, tí streymur ella veður ikki vóru til vildar sjálvan stevnudagin.

Svimjingin um Nólsoyarfjørð er ein fastur og afturvendandi táttur, sum setir sín serstaka dám á ovastevnuna.

Tað er stuttligt at vera í bygdini, tá ið svimjararnir út á seinnapartin – ein fyri og annar eftir – koma í land, ymsastaðni fram við fjøruni. Bátur fylgir hvørjum svimjara, og í fjøruni í Nólsoy standa fólk og hjálpa teimum uppá land. Vanliga eru svimjararnir útlúgvaðir, tá ið málið er rokkið, og uppí á klettinum fáa teir beinanvegin okkurt at bíta í og okkurt at leska sær við.

Tórur yngstur

Í dag er aftur ovastevna, og í dag verður so aftur stuðulssvimjing.

Millum svimjararnar, sum leypa á bláman í Havn í dag, verður 12 ára gamli, Tórur Hansen.

Mamman eitur Guðrið og pápin, Hans Michael. Tey búgva í Havn. Tórur er hálvur nólsoyingur í faðirætt. Hans Michael er sonur Gabriel og Jolinu, sum í mong ár hava havt handil í Nólsoy. Í høvuðsstaðnum gongur Hans Michael í fótasporunum hjá pápanum; hann selir bæði matvørur og køkar.

Tórur eigur systkini, Vár, sum er 2 ár og Teit, sum er 5. Teitur er ógvuliga spentur, nú stóribeiggi fer at royna at fremja hetta roysnið, og tey siga, at hann reypar óført…

Men tað er ikki bara Teitur, sum er spentur. Tað eru Guðrið og Hans Michael so sanniliga eisini. Og hvør veit: Gongur alt, sum ætlað hjá Tóri, er ikki óhugsandi, at bæði abbin og omman í Nólsoy standa fyri honum, tá ið hann kemur til lands.

Tórur svimur annars hjá Havnar Svimjifelag, og hann hevur vunnið onkur heiðursmerki. Í sínari tíð vann mamman, Guðrið, eisini onkur heiðursmerki í svimjing.

- Jú, vit eru bæði ógvuliga spent, og vit halda, at tað hevði verið stuttligt, um Tórur, sum yngstur luttakari nakrantíð, hevði megnað at svomið um fjørðin. Hinvegin er hetta eitt upplivilsi í sjálvum sær, og vit gerast heldur ikki vónsvikin, um tað ikki eydnast honum at svimja um fjørðin.

Hans Michael vísir á, at gjøgnum árini hava fleiri svimjarar "lagt árarnar inn" á hálvari leið, tí krampi ella sjóverkur hava gjørt um seg.

- Nú vóna vit, at veðrið verður til vildar, og at Tórur ikki fær krampa á longu og krevjandi leiðini.

Róðin var 13

Tórur er ikki vanur at svimja í froskmannabúna. Hetta royndi hann fyrstu ferð í hesi vikuni. Tað vísti seg, at drongurin er so lættur og flýtur so væl í búnanum, at torført verður hjá honum at svimja bringusvimjing, um blýggj ikki verður hongt uppí búnan, sum ger, at hann liggur tyngri í sjónum.

- Nú fáa vit at síggja, hvussu hetta fer at laga seg, men vit fara at royna at finna út av, hvussu vit loysa málið, sigur Hans Michael Hansen.

Bæði pápin og mamman vænta, at Tórur fer at vinna um fjørðin – og tað ger Teitur so sanniliga eisini.

Yngsti svimjari, sum svomið hevur um Nólsoyarfjørð, er ivaleyst Róðin Simonsen, sonur Erlend og Joan Simonsen.

Róðin var bert 13 ára gamal, tá ið hann framdi hetta bragdið.

Erlendur hevur verið primus-motor aftan fyri hetta tiltak. Jákup av Skarði er hansara høgra hond.

Í dag ella komandi viku – viku 33 – selja vit FLYMO
Lat okkum tina brúktu FLYMO maskinu, og tú fært størri avsláttur, treytin er bert, at maskinan er rein.
ÚTSØLA AV FLYMO PLENUKLIPPARUM
luftpútuklipparar, runnatrimmarar og kantklipparar
- fyri lægri prísir enn áður
THOMAS DAM Á HÁLSI
HEYKAVEGUR 3 • TÓRSHAVN • TELEFON 311 400 • TELEFAX 215 574
Gamal í garði - dyggur í ráðum
Ihdarmiboost.dk/sort.fo

Tilboðsferðir
frá Atlantic Airways

Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar
1.795,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.
Bilegging áðrenn 29/9 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 7/8 til 6/10 2003
2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.
Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferð skal verða hósdag, fríggjadag ella leygardag. Heimferð skal verða sunnudag ella mánadag.

Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar
2.095,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.
Bilegging áðrenn 1/10 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 7/8 til 8/10 2003
2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.
Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 14 dagar.

Vikuskiftisferð til Billund
1.795,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.
Vel ímillum vikuskiftini 07/8 - 12/8 2003 ella 14/8 - 19/8 2003.
2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Serlig APEX-ferð til Billund
2.095,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.
Bilegging áðrenn 22/9 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 7/8 til 29/9 2003
2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.
Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 14 dagar.
Bilegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum.
ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo
SANSIR 355 355